**8. fl í Hoyvíkar skúla**

Til Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 3/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu (prutl)**

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu (prutl)**

**§ 1**

Í løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 49 frá 11. mai 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 18, stk. 3 verður “16” broytt til “15”.
2) Í § 44, stk. 6 verður “Á tveyhjólaðum prutli má bert førarin vera” broytt til “ Á tveyhjólaðum prutli kunnu tvey sleppa at sita á ísenn”.

**§ 2**

Í kunngerð nr. 82 frá 13. desember 1963 um súkklur vi hjálpimotori (prutl), sum seinast broytt við kunngerð nr. 102 frá 4. desember 1980, verður gjørd hendan broyting:

1) Í § 2, stk. 1, litra b verður “30 km/t” broytt til “45 km/t”.

**§ 3**

Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2011.

**Viðmerkingar**

*Viðmerking til fyrstu broyting í ferðslulógini*
Aldursmarkið at koyra skutara skal setast niður frá 16 til 15 ára aldur. Tað er sera stutt ímillum skutarakoyrikort og koyrikort til bil og 15.000-30.000 kr eru sera nógvir pengar at nýta til ein skutara, sum tú vanliga bert brúkar í umleið tvey ár.

Løgreglan upplýsir, at umleið 30% av teimum, sum teir steðga á skutara, eru fimtan ára gomul. Av tí at tað eru so nógv, sum koyra á skutara undir loyvdan aldur, verður ferðslan ikki serliga nógv økt, um aldursmarkið verður sett niður til 15 ár.

Í summum førum eru tað ung, sum keypa ein gamlan, vánaligan skutara fyri lítið av pengum. Í slíkum førum er tað ofta, at lyktir, bremsur og tílíkt ikki riggar. Tað kann føra við sær, at ferðsluóhapp henda. Tey ungu keypa sær slíkar vánaligar og bíligar skutarar, tí tey tíma ikki at keypa ein dýran skutara, tá tey bert koyra á honum í tvey ár.

*Viðmerking til næstu broyting í ferðslulógini*
Skutarin er gjørdur til, at tvey fólk kunnu sita á honum ísenn. Tað eru nógv, sum koyra við einum persóni afturat sær sjálvum á skutaranum. Fá ferðsluóhapp eru hend í Føroyum, har tvey fólk hava sitið á skutaranum, og bæði hava verið edrú. At sita tvey á skutara er eisini ein partur av mentanini hjá ungdóminum. Um tað skal vera loyvt tveimum fólkum at sita á skutaranum ísenn, skulu bæði hava hjálm.

*Viðmerking til triðju broyting í ferðslulógini*
Loyvt skal vera at koyra 45 km/t staðin fyri 30 km/t á skutara

Bilarnir hava loyvi at koyra 50 km/t í bygdum øki, men skutararnir hava bert loyvi at koyra 30 km/t í bygdum øki. Við hesi lágu ferð tarna skutararnir ferðsluni. Koyrir tú á skutara niðan eina bratta brekku (t.d. Mannbrekku ella Brøttubrekku), fer ferðin kanska niður á 15 km/t. Við so lágari ferð kann tað vera ringt at halda skutaranum upprættum, og beinini mugu tískil takast til hjálpar.

Umleið 95% av teimum, sum koyra skutara, tuna teir, tí tey tíma ikki at koyra 30 km/t.
Tá skutarin verður tunaður, er upprunaliga ætlanin t.d., at skutarin skal kunna koyra 50 km/t, men tá ein longu er komin í gongd við at tuna skutaran, endar tað kanska við, at skutarin kann koyra upp í 80- 90 km/t.

Um skutarar høvdu havt loyvi at koyrt 45 km/t, høvdu tað uttan iva verið færri, sum tunaðu skutaran, og høvdu sostatt koyrt lógliga. Løgreglan hevði kunnað brúkt meira tíð at tikið tey, sum koyra ófantaliga og alt ov skjótt, ístaðin fyri at taka tey, sum koyra hampiliga, men ólóliga, tí tey koyra 45 km/t.

Summi, sum koyra skutara við 40 - 50 km/t, eru sera bangin fyri at verða tikin av løgregluni, tí tey koyra skjótari, enn loyvt er. Í slíkum førum kann tað føra við sær, at tann, sum koyrir, bert hugsar og hyggur, um løgreglan er har, og gloymir tí at hugsa um vegin og ferðsluna. Slíkar hendingar kunnu síðan blíva til ferðsluóhapp.

Um hesi uppskot skulu samtykkjast, er neyðugt, at tey, sum taka skutarakoyrikort, fáa ordiliga frálæru. Tey skulu taka eitt teoriskeið og hava roynt at koyrt skutara, áðrenn tey sleppa at koyra á almennum vegi.

Tá tú tekur skutarakoyrikort í Føroyum, fært tú nakrar spurningar, sum tú skalt svara. Hevur tú svarað nóg nógvum spurningum rætt, fært tú koyrikort til skutara. Tú kanst sostatt fara út at koyra skutara á almennum vegi, uttan at tú hevur prógvað, at tú dugir at koyra. Í ringasta føri dugir tú ikki at koyra skutara og kanst lættliga koma út fyri einum ferðsluóhappi.

Um tað skal vera loyvt tveimum fólkum at sita á skutaranum ísenn, skulu bæði hava hjálm á høvdinum.

Eins og vit í 8.d í Hoyvíkar skúla, helt løgreglan í ferðsluni, at hesi uppskot kunnu setast í gildi í ferðslulógini.

**Á Løgtingi, tann 8. februar 2010**

Katrin Dahl Hanusson　　Andreas Samuelsen　　Laila Midjord

Sudarat Niyomtham　　Niclas Vágsheyg Brixen　　Hávarður Guttesen